(6)

<u>Hoyringsskriv frá Viðgerðarheiminum Heilbrigdi í sambandi við "Uppskot til løgtingslóg um virksemi á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum."</u>

Á Heilbrigdi taka vit sum heild undir við uppskotinum og halda tað vera gott, at formlig krøv verða sett um til dømis førleikastøði, mannagongdir, góðkenning og fysiskar karmar á føroyskum viðgerðarstovnum.

Fyri Heilbrigdi viðkomandi er støðan tann, at vit frammanundan halda okkum lúka treytirnar í uppskotinum. Til dømis er tað altíð ein serlækni (vit hava tryggjar serlæknar, sum skiftast at hava vakt 24 tímar um døgnið alt árið) frá Landssjúkrahúsinum, sum í hvørjum einstøkum føri eftir persónliga viðtalu/visitatión innskrivar misnýtarar til viðgerð á Heilbrigdi. Hesir serlæknar hava sjálvsagt tætt samstarv við psykiatriina og føroyska sjúkrahúsverkið sum heild. Ein sjúkrarøktarfrøðingur er eisini í føstum starvi á stovninum, eins og virkandi programmleiðarin er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur – tað er tó ikki eitt krav fyri at kunna virka sum programmleiðari. Eisini hava vit tveir útbúnar misnýtsluráðgevar og ein útbúnan sosialráðgeva.

Eisini hava vit frá apríl 2019 tveir viðgerðar, sum kunnu geva akupunktur eftir undirvísingini hjá NADA í Danmark. Møguliga leggja vit DAT útbúgvingina inn eisini, hon er góð at hava afturat misnýtsluráðgevingini.

Tó er tiltrongt, at ábøtur verða gjørdar á viðgerðartilboðini á Heilbrigdi og karmarnar kring tey.

Av somu orsøk teljast uppstiging/útbúgving av viðgerðum og øðrum starvsfólki, normering av serførleika í psykologi/psykiatri, málrættað tilboð til ung og familjur, eftirviðgerð og víðkað innskrivingartíðarskeið (móttøka sjey dagar um vikuna alt árið) millum fremstu raðfestingar hjá stovninum í ár og tey næstu árini.

Eitt, sum liggur allarfremst er at fáa útbúgving til ráðgevarnar eftir Minnesota modellinum. Ynskiligt er at hesar vera líknandi teimum, sum vera nýttar í eitt nú Íslandi og at landslæknin góðkennir hesar, soleiðis sum tey eisini gera í Íslandi. Hetta er nakað vit arbeiða við beint nú.

Heilbrigdi er einasti viðgerðarstovnur í Føroyum, ið viðgerð misnýtslu eftir sonevnda Minnesota-leistinum, eisini nevnt 12-stiga skránni. Minnesota-leisturin verður roknaður sum nógv tann mest nýtti í Heimshøpi. Viðgerðin byggir á tey 12 stigini hjá Anonymum Alkoholikarum, AA. Stovnurin hevur tó ongar bindingar til AA ella aðrar felagsskapir, men virkar sum sagt í tøttum samstarvi við føroyska sjúkrahúsverkið. Ein aðalregla í 12 stiga viðgerðini er, at tað eru royndirnar hjá edrúum alkoholikarum/misnýtarum, sum skulu hjálpa øðrum alkoholikarum/misnýtarum burtur úr misnýtsluni.

Málið hjá Heilbrigdi er, at allir viðgerðar á stovninum innan tvey ár hava góðkenda útbúgving sum Minnesota-viðgerðar.

Velbastaður 25. januar 2019

Sjúrður Knudsen
stovnsleiðari, Heilbrigdi